Somu rutur sum í fjør

Í ár verður fyri fyrstu ferð súkklað til Saksunar, og sum undanfarin ár, endar kappingin í Havn

SÚKKLING
Páll Holm Johannesen

Fyrireikararnir av kappingini Statoil Kring Føroyar, hava í ár valt somu rutur sum í fjør. Nakrar broytingar eru tó framdar á sjálvum teinunum í kappingini, men súkklað verður á somu oyggjum sum í fjør. Broytingarnar eru gjørdar við tí fyri eyga, at kappingin skal gerast tryggari hjá súkklarunum, og at undirhaldsvirðið skal hækkast.

Nøkur óhapp vóru í kappingini í fjør, og tí hava fyrireikararnir valt at síggja burtur frá teimum teinum, ið kunnu tykjast vandamiklir fyri súkklarnar. Ætlanin er eisini, at kappingin í ár skal gerast meira áskoðaravinarlig. Undanfarin ár hevur áskoðarin verið eitt sindur villleiddur, serliga tá súkklarnir hava súkkla býarkoyring.

Vanligt hevur verið bæði í Havn og inni í Runavík, at súkklarnir enda etapurnar við at súkkla fleiri ferðir inni í býnum. Hjá áskoðarunum hevur hetta verið villleiðandi, tí teir hava havt ilt við at skyna á, hvørjir súkklarnir eru sum fremstir ella aftastir. Í ár vilja fyrireikararnir koma hesum trupulleika til lívs, og tí skulu súkklarnir bara súkkla tí einu ferðina runt inni í býunum í ár.

Gunnar Dahl- Olsen og hinir luttakararnir í Statoil Kring Føroyar, súkkla somu rutur, sum í fjør.

Mynd: Savnsmynd

Byrja verður í Klaksvík

Í morgin verður Prologurin í Klaksvík. Byrja verður við Statoilstøðina í Klaksvík, og súkklað verður úr býnum, út ímóti byrgingini við Haraldsund og innaftur á Statoilstøðina. Talan verður um ein einkultstart, og teinurin er átta kilometrar. Kappingin byrjar kl. 18.15

Dagin eftir verður farið inn á Eysturoynni. Sum nakað nýtt byrja súkklarnir á Statoilstøðini í Gundadali, og málið verður við Statoilstøðina við Runavík. Súkklarnir súkkla fyrst um Streymin, og síðani inni í Eysturoynni.

Í fjør endaði kappingin við, at súkklarnir súkkladu fleiri ferðir runt inni í Runavíkini, men í ár verður hetta bara gjørt tí einu ferðina. Etapan í Eysturoynni er, við sínum 120 kimometrum tann longsta í kappingini. Byrjað verður í Gundadali kl 12.30, og fyrstu súkklarnir skuldu verið á mál umleið kl. 15.30

Fríggjadagin verður aftur ein einkultstartur, hesaferð á Sandoynni. Teinurin byrjar sum vanligt við Statoilstøðina á Sandi, og síðani verður súkklað inn í Traðardal, yvir um brúnna á Sandafløttinum, og súkklarnir koma á mál aftur við Statoilstøðina. Einkultstarturin á Sandoynni verður væl longri enn tann í Klaksvík, hann verður 27 kilometrar. Kappsúkklingin fríggjadagin byrjar 15.30

Enda á Streymoynni

Fjórði- og fimti dagur í kappingini verður ávikavist á Suðuroynni og á Streymoynni. Leygardagin verður byrjað frá Statoilstøðini á Tvøroyri, útímóti Sevmýri, har leiðin so gongur ímóti Vágs bygd. Komnir á Vág, venda súkklarnir við, og súkkla suður á Tvøroyri aftur, har málið aftur er við Statoilstøðina.

Í etapuni á Suðuroynni verður talan um ein sokallaðan masterstart. Hetta er ein samlaður startur, har súkklarnir skulu fylgjast teir fyrstu 10-15 kilometrarnar. Teinurin er 80 kilometrar, og væntast kann, at teir fremstu súkklarnir nýta góðar tveir tímar um teinin. Byrjað verður kl. 12.30

Kappingin endar sunnudagin á Streymoynni. Teinurin strekkir seg av Eiði til Havnar. Fyri fyrstu ferð verður farið til ein túr til Saksunar, og hagar útaftur til Hvalvíkar, og síðani ímóti Havnini. Komnir til Havnar, verður ein runda súkklað inni í býnum, og komið verður á mál við Statoilstøðina í Gundadali.

Farið verður av Vaglinum á Eiði kl. 13.00, og umleið 16.40 skuldu fyrstu súkklarnir komið á mál í Gundadali. Vinnarnir av kappingini verða kosnir umleið 17.00.

Altjóða dómari

Høvuðsdómarin í Statoil Kring Føroyar, Hans Elmgren, skuldi fyrireika EM í banasúkkling, men valdi heldur at koma til Føroya.

SÚKKLING
Páll Holm Johannesen

Høvuðsdómari í Statoil Kring Føroyar í ár, verður danin Hans Elmgren. Hjálparar hjá honum verða Jens Glerup og vinnarin av kappingini í fjør, Bogi Kristiansen. Eftir trupulleikarnir í fjør, vilja fyrireikararnir gera alt fyri, at somu trupulleikar ikki taka seg uppaftur í ár. Hetta verður fyrstu ferð, at høvuðsdómarin er útlendingur. Undanfarin ár hava hjálpardómararnir í ár, Bogi Kristiansen og Jens Glerup verið høvuðsdómarar.

Í fjør blivu nakrir av bestu súkklarunum í kappingini, harímillum føroyingurin Rógvi Johansen, ákærdir fyri at súkkla sum eitt lið. Endin gjørdist, at hesir súkklarar tóku seg úr kappingini, og hvørgin teirra hevur valt at luttaka í ár. Um liðsúkkling verður aftur verður at síggja í ár, er ilt at meta um frammanundan, men í ár hava fyrireikarnar fingið sær ein dómara við nógvum royndum.

Ætlanin var, at Hans Elmgren skuldi fyrireika EM í banasúkkling í Týskland, meðan Statoil Kring Føroyar er, men hann hevur heldur valt Statoil Kring Føroyar. Hann er sjálvur gamal súkklari, og er í løtuni blaðstjóri á blaðnum Cykleren. Tá Sosialurin spurdi fyrireikararnir um hvussu tað bar til, at hann hevði valt koma hendanvegin, søgdu teir, at hann var sera áhugaður í at koma at kenna føroysku súkklingina betur, og at hann var ikki sørt forvitin av, hvussu føroyingar skipa fyri súkklukappingum.

Umframt, at verða høvuðsdómari, skal Hans Elmgren skal eisini halda nakrar fyrilestrar um súkkling, meðan hann vitjar í Føroyum.

Trý sløg av lógum

Statoil Kring Føroyar er samansett av trimum lógarsettum, altjóða I.C.U lógum, ferðslulógini og kappingarlógirnar hjá súkklusambandinum. Allar súkklukappingar skulu lúka altjóða lógunum, meðan ymiskt er hvussu ferðslulógirnar eru í teimum ymisku londunum.

Av tí vegirnir í Føroyum ikki eru teimum breiðastu, seta fyrireikarnar seg ikki fyri av trygdarorsøkum at hava fleiri enn 40 súkklarar við í kappingini. Umframt altjóða lógir og ferðslulógir, skal dómarin eisini fylgja kappingarlógunum hjá súkklusambandinum. Tað heldur óvanliga við kappingini Statoil Kring Føroyar er, at líkamikið aldur, kyn ella dygd, so súkkla øll ímóti øllum.

Føroyingar eiga yngstu luttakararnar

Serliga er spenningur um, hvussu ungi Hans Krosstein fer at klára seg

SÚKKLING
Páll Holm Johannesen

Av teimum 32 súkklararnum, ið hava boðað frá luttøku til Statoil Kring Føroyar, eiga føroyingar teir yngstu luttakararnar. Yngsti luttakarin er argjadrongurin Bergur Johansen, ið hevur súkkla í eitt gott ár.

Bergur er 13 ára gamal, og hevur luttikið á øllum stevnunum í ár. Í sínum aldursbólki, dreingir 12-14, liggur hann nummar tvey. Bergur er ungur og evnaríkur súkklari, sum hevur framtíðina frammanfyri sær. Súkklarar, Ið kenna Berg, sigur at er bygdur júst sum ein súkklari skal vera, hann er langur og slankur.

Av teimum yngstu luttakararnar, eru størst vónir settar til klaksvíkingin, Hans Krosstein. Hóast hann er júst byrjaður at súkkla, hevur hann fingið rættiliga góð úrslit. Hann er fremstur í grandprix-kappingini í sínum aldursbólki, og hevur eins og Bergur Johansen luttikið á øllum stevnunum í ár.

Dánjal Miichaelsen er trið yngsti luttakarin í kappingini. Dánjal luttekur í grand prix kappingini fyri unglingar , og í tí bólkinum liggur hann fremstur. Felags fyri teir yngru súkklararnar er, at um teir klára at gjøgnumføra kappingina, so verður tað mett sum eitt satt bragd.

Útlendingar í meiriluta

Danir eiga sterkastu súkklarnar í kappingini, og tað verður helst Richard Jones, Ið skal geva teimum kapping

SÚKKLING
Páll Holm Johannesen

Fyri fyrstu ferð verða útlendingar í meiriluta í kappingini Statoil Kring Føroyar. Føroyingarnir, ið hava boðað frá luttøku í ár eru, Gunnar Dahl- Olsen, Sverri Mohr Edvinson, Eli Christiansen, Esmar Joensen, Beinir W. Rasmussen, Jens Sigurð Simonsen, Christian Guttesen, Evald Rasmussen, Danjal Michaelsen, Hans Krosstein, Bergur Johansen, Robert Vilhelmsen og Geyr Gilsteinsson

Umframt hesar 13 súkklarnar verður føroyskt gifti Kenneth Ellefsen eisini við. Kenneth súkklar niðri í Danmark, og hevur valt at umboða Tórshavnar súkklufelag í kappingini. Kenneth hevur súkklað í fleiri ár, og hevur verið við onkra Ólavsøku-súkkling

Ynes Mon fyri fyrstu ferð

Hetta er sjeyndu ferð, tað verður skipað fyri Statoil Kring Føroyar, og fyri fyrstu ferð eru oyggin Ynes Mon umboða. Ynes Mon luttekur vanliga á oyggjaleikum, og tað er á oyggjaleikunum sambandið við súkklarnar á Ynes Mon er komið í lag. Danir hava verið fastir fúsir til kappingina seinastu fýra árini, og eru við aftur í ár.

Ynes Mon hevur átta luttakarar við, meðan 10 danir hava boðað frá luttøku. Hægst seedaði súkklarin frá Ynes Mon er Richard Jones. Ricard Jones er 33 ára gamal, og súkklar dagliga næst besta bólkinum í Onglandi. Fimm súkklarar av Ynes Mon eru úr bólki fýra í Onglandi, meðan tveir eru úr bólkinum V4, sum er fyri mótionssúklarar

Danir eiga teir báðar hægst seedaðu í kappingini í ár. Karsten Ellerup og Leon Vibholm súkkla ávikavist í bólki A og B í Danmark, og stórar vónir eru settar til teir báðar. Serliga Karsten Ellerup skuldi verið rættiliga væl fyri, og er favorittur at vinna kappingina í ár.

Hópurin úr Danmark er annars samansettur við súkklarum frá B- og C bólkinum.

Luttakaralistin í Statoil Kring Føroyar í ár

	Name	Nationality	Club	Age	Début year
1	Karsten Ellerup	Danish	Vejle CK	23	1996
2	Leon Vibholm	Danish	HAC	29	
3	Richard Jones	Ynes Mon		33	
4	Morten Truelsen	Danish	FIX Rødover	18	1997
5	Gunnar Dahl-O	Faroese	TSF	37	1991
6	Anders Rasmu	Danish	Lyngby CC	41	1995
7	Kenn Holmquis	Danish	FBL	32	
8	Kenneth Ellefs	Danish	TSF	30	
9	Christian Bran	Danish	Amager C R	31	1992
10	Aiden Bradley	Ynes Mon		20	
11	Dave Williams	Ynes Mon		35	
12	Sverri Mohr Ec	Faroese	TSF	36	1996
13	David Thomas	Ynes Mon		35	
14	Eli Christiansen	Faroese	TSF	17	2000
15	Henrik Guldagc	Danish	Viborg MTB Kl	22	1996
16	John Reis	Danish	Amager C R	28	1996
17	Stephan Phillip	Danish	Vejle CK	20	1996
18	Esmar Joensen	Faroese	TSF	26	1996
19	Arwel Jones	Ynes Mon		34	
20	Beinir W. Rasn	Faroese	TSF	29	1996
21	Gareth Blackst	Ynes Mon		23	
22	Jens Sigurð Si	Faroese	TSF	20	
23	Christian Gutte	Faroese	TSF	22	1996
24	Keith Thompsc	Ynes Mon		54	
25	Evald Rasmuss	Faroese	TSF	45	1997
26	John Barry Wil	Ynes Mon		50	
27	Allan Søndergi	Danish	Hammel Cykle	55	1990
28	Dánjal Michael	Faroese	TSF	15	2001
29	Hans Krossteir	Faroese	TSF	14	2002
30	Bergur Johans	Faroese	TSF	13	2001
31	Robert Vilhelm	Faroese	TSF	50	1999
32	Geyr Gilssteins	Faroese	TSF	37	1999

Gólvtilboð - Gólvtilboð

Laminat gólv
ymiskir litir, click system
fyrr 159,- m²
nú 129,- m²

14mm Parkettlamel
Kirseber ella Ask
fyrr 540,- m²
nú einans 230,- m²

parkettmynstra vinyl
4m breitt
vanl. prísur frá 495,- pr.m
nú einans 295,- fyri meturin

Frátikin Kelimteppi
ymiskir litir
ca. 140x200 – 170x240
Nú 1/2 prísur

Er tú í iva???
Spyr gólvserfrø ingin! vit taka mát og rá geva
Ókeypis

Profa Gólv
Smyrilsvegur 7
Tlf. 322494 Fax 322594
Box 2026 165 Argir